## Miðvikukvøldslestur í Sirkusi

Í kvøld 9. mars, sjálvan øskudagin, verður høvi at hoyra eitt av okkarar pennhegnastu, men av óskiljandi orsøkum enn at kalla óútgivnu høvundum, men tað er stuttsøguhøvundurin og fyrrverandi formaður í Rithøvundafelagnum Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð. At kalla óútgivin - men ikki heilt kortini. Nakrar av søgum sínum hevur Arnbjørn, trekliga, latið á prent í bløð og tíðarrit eitt nú Vencil.

Søgurnar hjá Arnbirni kunnu í stuttum lýsast sum hugnám av gerandislívinum og í minimalistiskum stíli, við neyvum málbúna strika tær upp løtumyndir av persónum og samskiftum teirra, sum javnan siga meiri um samtíð okkara og samfelagið enn mangar drúgvari og dramatiskari lýsingar.

Arnbjørn tók sjálvur annar stig til tíðarritið Vencil og hevur nú í skjótt fimm ár ritstjórna hesum Varðanum í nýføroyskum bókmentum, men starvast annars sum bókavørður á Landsbókasavninum.

Tiltakið byrjar sum vanligt klokkan 20 í Sirkus í Vágsbotni.




## Andru Emil á flottum ørðum plássi

Í sambandi við kølimessu í Odense í seinastu viku, varð skipað fyri Danmarksmeistaraheitinum í kølitøkni. Andru Emil Jensen, sum stendur í læru sum kølitøkningur hjá Vika Industry í Havn fekk eitt flott annaðpláss í kappingini.

– Andru Emil Jensen er fyrsti lærlingur innan kølifakið í Føroyum, og stuttligt var at síggja, at hann stóð seg væl, sigur Leivur Holm, sum er stjóri í Vika Industry.




*Myndin er tikin úr tyrluni, tá bjargingarmaðurin var komin niður í bátin*

*Mynd: Atlantsflog*

# Tyrlan bjargaði manni av fimmmannafari

**BJARGING Seinnapartin í gjár bjargaði tyrlan hjá Atlantic Airways einum 80 ára gomlum manni, sum var komin illa fyri í einum fimmmannafari í Djúpunum**

Eirikur Lindenskov

MRCC boðsendi bjargingartyrluni hjá Atlantic Airways kl. 15.00 at koma einum fimmmannafari til hjálpar, sum hevði fingið motorstopp og rak í Djúpunum út fyri Gjógv.

Umborð á bátinum var ein 80 ára gamal maður. Fólk á landi hvødu varnast, at okkurt var áfatt, tá fimmmannafarið við gamla manninum kom rekandi fram við Gjógv.

Tyrlan fór úr Vágum klokkan 15.19 og kom klokkan 15.38 til bátin, sum tá rak út fyri Riftanga. Maðurin umborð sat tá við árarnar. Tað var nógvur vindur – í hvirlunum upp í 35 metur sekundið – og sjey metur høg alda. Báturin lá soleiðis fyri, at nógvi vindurin elvdi til turbulens, og tí var torført hjá tyrluni at koma til hjálpar. Tað eydnaðist kortini at seta bjargingarmannin umborð á fimmmannafarið. Meðan bjargingarmaðurin var umborð, fekk fimmmannafarið ein sjógv, men báðir menninir vóru í øllum góðum lyftir umborð á tyrluna.

Tyrlan setti síðani kós móti Klaksvík, har hon setti seg klokkan 15.53, og maðurin varð fluttur á sjúkrahús. Tyrlan fór síðani aftur á staðið at hjálpa bjargingarbátinum »Ziska« at finna fimmmannafarið. Tyrlan kom fram á bátin, sum tá var rikin nakað vestur í hav.

# Bankar mugu tola nýggja kreppu

ES-myndugleikar fyrireika nú eitt nýtt umfar við sonevndum stresstestum av øllum bankum og sparikassum í Evropa. Endamálið er at avdúka, um teir tola eina nýggja kreppu.

Business-Lien skrivar, at tá úrslitini av stress-testini, ið var gjørd seinasta summar, vóru løgd fram, kendist ein ávísur lætti á fíggjarmarknaðunum. Bara sjey bankar stóðu ikki royndina og vildu í eini nýggjari fíggjarkreppu, ikki borið boð í bý.

Tveir mánaðir seinni vísti tað seg kortini, at tveir írskir bankar, ið høvdu staðið stressroyndina, máttu bjargast av myndugleikunum. Søgan endaði við, at Írland var um at kollsigla og mátti søkja um kreppulán úr ES og IMF.

Hesu ferð skulu bankarnir verða útsettir fyri einum scenario, har samlaða bruttotjóðarúrtøkan í ES minkar við 0,5 % í ár og 0,2 % í 2012, umframt eina niðurgongd á ognarmarknaðinum.

Kreppuscenariið skal eisini avdúka ávirkanina av hægri rentustøði og fall í virðum av partabrøvum á 15%

Sambært tíðindabrævinum Dow Jones Newswires, fara hesar stress-royndir ikki at innihalda scenarios yvir stats-skuld hjá ES-londunum.

*Kelda: www.bl.fo*




*Tað eru næmingar í NámX í Eysturskúlanum sum framføra leikin*

# Leikur um happing í Eystur-skúlanum

**BILASØLA Næmingar á NámX í Eysturskúlanum í Havn framføra leikin »Eitt døkt kamar« í Sjónleikarhúsinum**

Randi Jacobsen

Á NámX á Eysturskúlanum í Havn er ein lærari, sum eitur Harriet Poulsen Vágadal. Hon hevur sum lærari arbeitt nógv við happing, og hon skrivaði fyri 10 árum síðan høvuðsuppgávu á Læraraskúlanum um happing.

– Happing hvørvir ikki, um tú vendir henni tað blinda eyga ella tað deyva oyrað. Tað er alneyðugt, at vit øll, vaksin sum børn, eru tilvitað um happing í gerandisdegnum, tí tað kann vera sera skjótt, at vit koma til at siga okkurt, baktala og harvið særa onkran. Happing er vanvirðing fyri einum øðrum menniskja, sigur Harriet Poulsen Vágadal.

Út frá síni vitan og royndum hevur hon skrivað leikin, og hon hevur eisini leikstjórnað. Pallin hava næmingarnir sjálvir staðið fyri at gjørt, Marjun Olsen hevur lagt lag á við sminku, og Marjun Veihe, sum eisini undirvísir á NámX hevur stuðlað. Leikurin verður framførdur leygarkvøldið og sunnukvøldið, bæði kvøldini kl. 19.

Leikurin eitur »Eitt døkt kamar« og eru um 16 ára gomlu Elsu, sum verður happað, og hvussu happingin ávirkar umhvørvi hennara.